# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Í prinisippinum er hetta júst sum ein radiatorur, og hesir virka jú bara, um nokk av vatni er í skipanini. Tí ræður um at drekka heilt nógv*

*Sølvi Winther Olsen, ítróttalækni á Rhodos*

# Fyrsta liðkapping í 11 ár




*Sofus D. Johannesen, formaður í Judosambandi Føroya, og Búgvi Poulsen, landsliðsvenjari, uttanfyri The Ixian Grand Hotel á Rhodos*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Síðani 1995 hava føroyskir judoíðkarar einans umboða Føroyar sum einstaklingar í altjóða kappingum, men nú teir eru á Rhodos verður eisini tørnað til sum lið**

OYGGJALEIKIR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Judo: 1995 var árið, judo seinast var við á Oyggjaleikunum. Til ársins oyggjaleikir varð samtykt, at judo aftur skuldi sleppa upp í part. Gleðiligt, tí so høvdu føroyskir judoíðkarar endiliga okkurt at síggja fram. Tiltikna gularótin, sum ikki hevði verið har í 11 ár.

Hetta merkir tó ikki, at føroyingar ikki hava kappast á altjóða pallinum hesi árini millum 1995 og 2007. Árliga hevur verið farið uttanlands til kappingar, og judoíðkarar hava sligið seg til tols við, at tá man ikki kann fáa tað besta, so má man taka tað næstbesta. Tí meiri enn næstbest hevur tað ikki verið, tá føroyingarnir ikki hava kunnað kappast sum lið, men bara sum einstaklingar, tá teir hava verið í kappingum í eitt nú Hillerød ella við Limfjorden í Danmark.

Men nú er judolandsliðið aftur mannað, og Búgvi Poulsen, venjari, fegnast um hetta.

– Eg eri rættiliga spentur upp á hetta, og eg meti at vit sum lið eru rímiliga sterkir, segði Búgvi Poulsen, tá vit hittu hann og formannin í Judosambandi Føroya, Sofus D. Johannesen, við morgunmatarborðið á The Ixian Grand Hotel í morgun.

## Topp trý

Føroyingarnir hava fólk í seks av teimum tilsamans sjey vektbólkunum, kappast verður í. Einasta plássið, sum ikki er mannað, er vektflokkurin fyri tey, ið viga omanfyri 100 kg.

Sostatt er liðið sjálvt eftir øllum at døma vælmannað, men eisini sum einstaklingar hevur landsliðsvenjarin góðar vónir.

– Eg meti heilt víst, at vit eru rímiliga væl fyri sum einstaklingar eisini, sigur Búgvi Poulsen. Hann var sjálvur við sum íðkari á judoliðnum í 1995. Sofus D. Johannesen sigur, at liðið nú ikki er eins sterkt og tá, men kortini hevur hann eins og Búgvi Poulsen góðar vónir.

– Nú er tað avmarkað, hvat við kenna til hinar tjóðirnar, men ein plasering millum trý tey fremstu í liðkappingini og hjá einstaklingunum, hevði verið eitt frálíkt úrslit, sigur Sofus D. Johannesen.

Seinnapartin í dag fer føroyska judolandsliðið at venja í eini høll hjá einum lokalum felagið á Rhodos. Tað fara teir eisini at gera restina av døgunum, til teir skulu kappast sunnudagin. Inntil tað tíð snýr tað seg um – eins og hjá øllum luttakarunum á Rhodos – at fella til, venja seg við hitan og tær øðrvísi umstøður, sum her eru galdandi, og at drekka nóg mikið av vatn.

**Formulaliðið hesa vikuna**

